Beinta Løve Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um ensk tíðindi hjá KVF, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar eru ætlaninar hjá Kringvarpi Føroya við tíðindaflutninginum á enskum?

2. Hvat kostar skipanin við tíðindum á enskum?

Viðmerkingar:

Kringvarpið hevur týðandi leiklut í samfelagnum. Tí er eisini umráðandi, at Kringvarpið røkkur út til so nógv fólk sum til ber. Har hevur tíðindaflutningurin á enskum á heimasíðuni hjá Kringvarpinum stóran týdning. Tí alsamt fleiri í Føroyum hava annað mál enn føroyskt sum móðurmál. Fyri at fólk, sum ikki hava føroyskt sum móðirmál, eisini kunnu taka lut í samfelagnum og fáa vitan um, hvat gongur fyri seg í samfelagnum, er umráðandi, at tey fáa álítandi og góðan tíðindaflutning á enskum, sum flest allir útlendingar skilja.

Á Løgtingi, 19. januar 2021

Beinta Løve Jacobsen